# Á Fólkating at vinna okkum Frælsan Felagsskap



Val X
JOHN JOHANNESSEN
Javnaðarflokkurin

Vit skulu hava eina nýggja byrjan. Tað er avgerandi neyðugt, at Føroyar fáa ræði á sínum egna uttanríkispolitikki. Tí vil eg sum fólkatingslimur virka fyri einum nýggjum samstarvi við danir, har valdsbýtið millum partarnar verður ásett í nýggjum sáttmála, sum leggur lunnar undir avgerðir á føroyskum grundarlag.

Okkum tørvar eina nýggja byrjan. Alt ov ofta uppliva vit, at tað ikki ber til at røkja føroysk áhugamál úti í heimi, tí danir hava nakrar stirvnar løgfrøðiligar tulkingar av donsku grundlógini.

Hetta er vorðin ein forðing fyri føroyska samfelagið í alheimsgerðini. Og vandi er enntá fyri, at føroyski avgerðarrætturin verður smalkaður enn meira, nú danir leggja alsamt meira av uttanríkispolitikkinum til ES at umsita.

Tí er neyðugt, at vit taka spurningin um uttanríkispolitiska virkisføri okkara til gjølliga viðgerð. Vit kunnu ikki bara sova víðari og lata sum, at uttanríkispolitiska heimildarlógin er tann stóra bjargingin. Tí tað er hon ikki.

**Frælsur felagsskapur**
Ongin ivi er um, at tað framhaldandi ber til at hava eitt gott og gevandi samstarv við danir. Men neyðugt er, at partarnir í samstarvinum gerast javnari enn teir eru í dag. Yvirtøkulógin er eitt gott amboð fyri einum javnari samstarvi. Men enn tørvar okkum uttanríkispolitiskt virkisføri og harvið eisini møguleika fyri betri marknaðaratgongd.

Tí eiga vit at endurnýggja okkara samstarv, soleiðis at samstarvið ikki gerst ein spennitroyggja, sum forðar okkara menning og luttøku í altjóða samfelagnum, men tvørturímóti gevur okkum vakstrarmøguleikar. Til hetta krevst politisk nýhugsan og ikki minst politiskt dirvi.

Mítt tilmæli er, at vit seta ein bólk av politikarum og embætisfólkum úr bæði Føroyum og Danmark at greina hesi viðurskifti og virka fyri, at vit fáa ein nýggjan frælsan felagsskap, ið uppfyllir hesar treytir:

At Føroyar fáa standandi heimildir at samráðast við onnur lond og gera sáttmálar við tey.

Karmurin um samstarvi millum Føroyar og Danmark verður ein sáttmáli, har valdsbýtið millum partarnar er ásett. Hesin sáttmáli verður fráboðaður ST, og verður harvið tryggjaður í altjóðarætti.

At vit fáa nýggjan sáttmála, sum kemur í staðin fyri heimastýrislógina, sum fer úr gildi.

Sáttmálin skal tryggja, at Føroya Løgting og landsstýri verða hægsti myndugleiki og evsta vald í øllum málum, sum eru undir føroyskum málsræði.

Tann danska grundlógin verður ikki longur galdandi í Føroyum. Men Føroyar og Danmark eru tó enn saman gjøgnum eitt tætt samstarv, sum tó nú byggir á eitt javnari grundarlag gjøgnum Frælsa Felagsskapin.

**Samsvar við sjálvstýrislóg**
Alt hetta er í fullum samsvari við uppskotið um nýggja Sjálvstýrislóg, sum Javnaðarflokkurin longu fyri tíggju árum síðani samtykti at virka fyri. Tá staðfesti landsfundur Javnaðarfloksins:

"At vit áseta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í einum sjálvstýrissáttmála sum ein politiskan sáttmála millum tvey sjálvstøðug lond, ið viðurkenna hvørt annað sum javnbjóðis tjóðir í einum felagsskapi - ríkisfelagsskapi, samveldi ella frælsum felagsskapi."

Samtyktir Javnaðarfloksins á hesum øki kunnu lesast inni á heimasíðuni www.john.fo við at klikkja á "grundsjónarmið Javnaðarfloksins" og síðani á "yvirlýsingar". Hetta var tað, ið tann veruligi Javnaðarflokkurin ynskti at virka fyri, og tað ætli eg mær at fullføra – ikki gjøgnum konfrontatiónskósina, heldur ikki við at vera púra óvirkin, men við virkisfýsni og í góðum samstarvi við danir.

# Javnaðarflokkurin ríður á tveimum hestum



Val X
JASPUR VANG
Sambandsflokkurin

Flokkurin hevur seinastu árini stuðla fullveldistilgongdini og harvið avreitt sosialu virðini, hann saman við Sambandsflokkinum áður stóð fyri.

Støðufestið Sambandsfloksins er tí einasta veruliga trygdin fyri einum sterkari ríkisfelagsskapi og størri sosialum frambrotum her á landi.

**Andsøgnin, sum prógvar veruleikan**
Vit kunnu staðfesta, at javnaðarflokkurin, hóast hann sigur seg vera ein sosialan flokk, var til reiðar at skerja ríkisveitingina við 103 mió.,

ikki vildi vera við til at dagføra ríkisveitingin við ársskiftið 2006/2007 og harvið viðgekk, at flokkurin í veruleikanum tók undir við fullveldisflokkunum, tá teir skerdu ríkisveitingina við 366 mió. kr árliga, eins og formaður floksins hevur lagt upp til, at ríkisveitingin skal falla burtur ár 2015.

Javnaðarflokkurin hevur soleiðis fult og heilt góðtikið, at føroyska samfelagið seinastu fáu árini hevur mist meira enn 2,2 milliardir krónur, sum er upphæddin, skerjingin í ríkiveitingini higartil hevur kostað føroyingum, eins og Javnaðarflokkurin er til reiðar at skerja inntøkur landskassans enn meira.

Førdi politikkurin er tí beinleiðis í andsøgn við tosið um fleiri vælferðartilboð, útbyggingar av undirstøðukervinum v.m.

**Ullintur boðskapur og ráksnúni**
Eftir landsfundin farna vikuskifti hevur Javnaðarflokkurin undir heitinum "sjálvstøðugt samstarv" boðað frá, at hann fer at reka praktiskan politikk á ríkisrættarliga økinum. Løgið hevði tað verið, um flokkurin ætlaði sær at reka ópraktiskan politikk. Slíkum ullintum boðskapi skal ein leita leingi eftir. Útmeldignin kann tí ikki skyljast øðrvísi, enn at ráksnúni heldur enn hugsjónir framvegis fer at eyðkenna politikk floksins á ríkisrættarliga – og sosiala økinum.

Fyrr enn Javnaðarflokkurin greitt hevur boðað frá, hvørja støðu hann hevur í spurninginum um ríkisveitingina, og hvørt flokkurin framhaldandi ynskir at verða í ríkisfelagsskapinum, veit ongin, hvar Javnaðarflokkurin flýtur.

**Valgrugg**
Orðatakið sigur, at tað ber ikki til at blása og hava mjøl í munninum. Vælferðartosið á landsfundi Javnaðarfloksins nú um dagarnar, samstundis sum flokkurin ikki meldar greitt út í spurninginum um ríkisveitingina og ríkisrættarligu støðu Føroya, kann tí ikki skyljast øðrvísi, enn at talan er um valgrugg.

**Samandráttur**
Tað ber ikki til hjá Javnaðarflokkinum - eins og Fólkaflokkurin - áhaldandi at ríða á tveimum hestum, alt eftir um tíðirnar búskaparliga eru góðar ella ringar og atkvøðurákið harvið ber móti loysing ella sambandi.

Um ikki javnaðarflokkurin tekur støðu, saðlar um og saman við Sambandsflokkinum verjir borg mótvegis loysingsvonginum í føroyskum politikki, er vandi fyri, at vælferðin fer fyri skeyti.

# Fríggið er so inniligt



Val X
FINNUR HELMSDAL
Tjóðveldi

Vit hava júst sæð og hoyrt yvirlýsingar frá landsfundi Javnaðarfloksins. Nakrar komu undan fundinum, aðrar aftaná. Nú skal flokkurin aftur á gomlu sosialdemokratisku kósina, nú skulu gomlu sosialdemokratisku vørumerkini aftur á hillina, ljóðaði áðrenn fundurin byrjaði. Og undir og aftan á fundin varð dúliga reypað av avrikum viðvíkjandi pensiónum og øðrum á sosiala økinum. Jú, jú alt í besta javnaðaranda, og sjálvt um Helle bert kom á skýggjan, so taldi hon eisini fitt av stigum á pluss síðuna. Javnaðarfólk megnaðu at øsa seg sjálvi og hvørt annað so nógv, at eingin teirra var bert eina løtu í iva aftan á fundin: Flokkurin vinnur bæði valini, sum standa fyri durum. Sum fundurin leið, bleiv ryggurin bara meira rættur hjá ymsu tingmonnunum, onkur bleiv so lættur og kátur, at tað var um reppið, at hann fór uppfrá. Orsøkin var sjálvandi, at teir hesa løtuna kláraðu at billa sær sjálvum og øðrum inn, at loksins var fólksflokshamurin tveittur. Teir kendu seg eina løtu sum javnaðarmenn, og ikki sum fólkafloksjavnaðarmenn. Tú sá á flestu teirra, at hetta var teimum ein eitt sindur fremmand kensla, og kanska heldur ikki so unnilig allíkavæl, men teir vistu at hetta var neyðugt, og dugdu tí at spæla leiklutin. Teir vistu allir, at longu sunnudagin fór at bera til at sleppa sær í aftur fólkaflokshamin, tí fall tað teimum lætt at spæla javnaðarmenn eina løtu. Vit kunnu siga, at tingmenn Javnaðarfloksins hava havt ein, eitt sindur frívillugan, leiklut sum kópakonur hetta vikuskiftið.

**Fríggið er so inniligt**
Ein, sum sær Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin virka saman dagliga, hann ivast ikki eina løtu í, at so inniligt fríggj er ikki einum og hvørjum beskorið at eygleiða. Ja, teir minna ein á, hvussu tað var í Klubbanum í 70'árunum. Seinasti dansur, og gólvið er á tremur við pørum, sum eru meira vavd saman enn dansa. Ein sær ikki mun, tí gentur og dreingir hava eins hár og eins klæði. Skipstroyggju og kowboybuksur. Tú sær eftir hondini heldur ikki mun á javnaðarmonnum og fólkafloksmonnum. Teir eru so saman vavdir í kjálkadansinum. Fríggið kann rætt og slætt ikki vera meira inniligt. Tann, sum kanska hevur hugsað um koma upp í millum hetta forelskaða parið skal bara vita tað, at Javnaðarflokkurin verður ikki tann, sum fríggjar uttanum. Teir hava bert hug á einum, og tað hava teir havt leingi, leingi.

Eitt er at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin flætta ideologiskar fingrar, tað kunnu vit onnur líka sum ikki blanda okkum uppí. Verri er, at parið, í heilum, gevur hvørjum øðrum gávur, sum allar eru beinleiðis fíggjaðar úr landskassanum, og tvs av okkara skattakrónum. Hesar gávur eru so stórar og dýrar, at tær longu hava oyðilagt gjaldførið hjá landskassanum. Spell, ikki minst tá hugsað verður um, at somu gávur bert og bert gagna teimum sjálvum. Nú undan valunum fara teir at býta út pakkar, har sosialisma er skrivað á við reyðum. Men tá pakkað verður upp aftan á valið, er tað eitt høvd av Óla Breckmann, sum loypur upp úr eskjuni.